# Ólavsøkuhaldið í Keypmannahavn

**Ólavsøkutiltakið, sum í nógv ár hevur verið ein fastur táttur í Keypmannahavn, verður aftur í ár hildið úti á Norðuratlantsbryggjuni mánadagin hin 28. juli**




Síðani hin 1. februar í ár hevur fyrireikingarbólkurin miðvíst arbeitt við at fáa eina so spennandi og fjølbroytta skrá sum tilberð. Hetta má sigast at hava eydnast bólkinum væl.

Sum liður í at gera eitt so spennandi tiltak sum gjørligt, varð plakatkapping útskrivað í apríl mánaði í ár. Vinnarin gjørdist Kaj Otto, ið teknaði eina sera snøgga plakat. Professionellu og fremmandu dómararnir vóru ikki í iva, tá ið vinnarin skuldi finnast.

Ólavsøkubólkurin er hvørt ár mannaður við fólki úr føroysku feløgunum í Keypmannahavn. Tey, sum ár hava lyft byrðuna, eru: Hans Petur í Brekkunum, Heini Davidsen, Martin Fjallstein, Judith og Mogens Nielsen, Jóannes Højgaard og Georg Thomassen.

Afturat hesum koma eini 25-30 fólk, sum fara at hjálpa til á sjálvum hátíðardegnum.

Sum nakað nýtt verður hátíðarhaldið bert ein dag, men hinvegin verður dagurin á tremur við sera góðum undirhaldi fyri yngri sum eldri.

Eitt so stórt tiltak letur seg ikki gera uttan dyggan stuðul, og Ólavsøkubólkurin vil í hesum sambandi senda øllum okkara stuðlum eina stóra tøkk fyri hollan stuðul og hjálp fyri, at tiltakið enn einferð gjørdist veruleiki.

Føroyahúsið
Atlantic Airways
Tórshavnar Býráð
P/F Poul Michelsen
Norðuratlantsbryggjan
Færøernes Turistråd
Eikgrunnurin

## Ólavsøkuskrá

Á Norðuratlantsbryggjuni mánadagin hin 28. juli

Kl. 14.00: Ólavsøkan byrjar
Guðstænasta, Bergur prestur prædikar í listaskálanum á Bryggjuni.
Matsøla, grill, poppkorn o. a. á bryggjuni
Andlitsmáling
Fiskitjørn fyri børn
Framsýning við Trónda Paturssyni á Bryggjuni
Framsýning í Olivin á 5. hædd "Nætter af lys - dage af mørke"

Kl. 15.00: Ólavsøkan verður sett á Bryggjuni
Hans Petur í Brekkunum heldur Ólavsøkurøðuna, eisini verður felagssangur og føroyskur dansur.
Harmonikutónleikur á bryggjuni

Kl. 16.00: Kappróðurin á Ólavsøku í Havn sendur yvir hátalarar á Bryggjuni
Framsýning fyri skúlabørnum (møtt verður í móttøkuni á Bryggjuni)
Okkara bátar liggja í hylinum

Kl. 17.00: Randi Holm framførir Kópakonuna fyri børnum á 5. hædd

Kl. 18.00: Bátauppvísing – kappróður, kajakkir
Heini Davidsen er frásøgumaður

Kl. 18.30: Tónleikur á Bryggjuni
Guðrun Sólja Jacobsen syngur og Hylle spælir guitar.

Kl. 19.30: Ólavsøkukonsert við Martin Joensen á 5. hædd (entré)

Kl. 21.00
Harmonikudansur á 5. hædd (entre)
Regin Jacobsen - harmonika
Flóvin Jacobsen - harmonika
Andras Danielsen- bass og sang

Kl. 23.00: Midnáttarløta á bryggjuni
Midnáttarrøða - Heðin Mortensen, borgarstjóri,
Midnáttarsangur - Ernst Dalsgarð syngur fyri.
Fýrverkarí

Kl. 00-04: Ólavsøkudansur við Mikkel Thomas Band á 5. hædd (entré)
Mikkel Thomas
Janus Kampmann
Agnar Lamhauge

# Rætting til Ólavsøkuskránna

## Soleiðis er skráin á Hotel Hafnia á Ólavsøku

**Leygardagur 26. juli**
**Restaurant Hafnia:**
**ólavsøkumatskrá kl. 18.00-21.30**
**Hafnia lounge opið frá kl. 14.00**
**Café Høllin er ikki opin, sum lýst í ólavsøkuskránni.**

**Sunnudagur 27. juli**
**Restaurant Hafnia:**
**Sunnudagsmatskrá kl. 12.00-18.00**
**ólavsøkumatskrá kl. 18.00-21.30**
**Hafnia lounge opið frá kl. 14.00**
**Café Høllin er ikki opin, sum lýst í ólavsøkuskránni**

***Mánadagur 28. juli***
**Restaurant Hafnia:**
**Ólavsøkumatskrá kl. 12.00 – 22.00**
**Hafnia Lounge opið frá kl. 14.00**
**Café Høllin: frá kl. 15.00 er leskiligt køkuborð og kl. 17.00 er eisini heitur rættur**

***Týsdagur 29. juli***
**Restaurant Hafnia:**
**Ólavsøkumatskrá kl. 12.00 – 22.00**
**Hafnia Lounge opið frá kl. 14.00**
**Café Høllin: kl. 11.00**
**Ólavsøkuskrúðgongan á stórskíggja. Søla av kaffi o.ø**
**Café Høllin: kl. 12.00 Leskiligt køkuborð og heitur rættur**




